## Familjugudstænastu í Vesturkirkjuni sunndagin

Sunnudagin verður familjugudstænasta í Vesturkirkjuni klokkan 11. Sunnudagsskúlin byrjar aftur, og konfirmantarnir, sum skulu konfirmerast í heyst og í vár, møta. Bergur Debes Joensen, prestur, sigur, at kirkjukaffi verður aftaná í kjallaranum, har okkurt gott er til børnini eisini. Og hann heilsar, at øll eru hjartaliga vælkomin!



## Grønlandsbørnini kannast

Konservativi Fólkaflokkurin í Danmark krevur nú, at málið um tey 22 grønlendsku børnini, sum vórðu tvingsilsflutt til Danmarkar í 1951, skal kannast til botns. Tað sigur fólkatingsmaðurin Per Ørum Jørgensen. Hann er framsøgumaður í grønlendskum viðurskiftum og vísir á, at grønlendski landsstýrisformaðurin, Kuupik Kleist, hevur biðið um eina tílíka kanning. Per Ørum Jørgensen sigur við DR, at málið við teimum grønlendsku royndarbørnunum er ein svartur kapittul í søguni, og at danir hava skyldu til at kanna, hvat hendi, og hví tað hendi.

# Milliónirnar bíða

**Stóra byggiætlanin hjá Eileri Jacobsen í Skálavík kemur ikki í gongd. Nú verður bíðað eftir skatta- og avgjaldskærunevndini, tí Elier Jacobsen finnur seg ikki í at skula gjalda meirvirðisgjald av allari byggingini**

SKATTAMÁL

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*






*Stórt lendi hoyrir til økið, har Eiler Jacobsen ætlar at byggja Immanuel*

Nú er næstan eitt ár liðið, síðan arbeiðið við at planera økið undir húsinum, sum Eiler Jacobsen hevur í hyggju at byggja í Skálavík.

Byggimeistarin, sum skal gera arbeiðið, er klárur, men hann noyðist at bíða nakað enn.

Orsøkin til seinkanina er ósemja millum felagið hjá Eileri Jacobsen og Taks.

Taks hevur kravt, at mvg verður goldið av allari bygginini, men hin parturin sigur nei. Sakførarin hjá felagnum heldur, at húsið, sum byggast skal, er at rokna sum eitt gistingarhús, men Taks heldur upp á sítt.

Eiler Jacobsen hevur sent kæru til skatta- og avgjaldskærunevndina. Kæran varð send inn fyri fleiri mánaðum síðan, men svar er einki komið enn. Nevndin hevur fund aftur í fyrsta lagi 2. september.

- Vit vilja vita, hvussu nógv mvg vit skulu gjalda, áðrenn vit byrja, sigur Eiler Jacobsen.

Mvg-spurningurin er rættiliga avgerandi, tí noyðist eilar Jacobsen at gjalda mvg av øllum, verður øll ætlanin fjórðin dýrari.

- Onnur sleppa ikki í gongd, tí tey fáa ikki fígging. Hjá okkum standa 20 millónir krónur bara og bíða eftir at verða brúktar. Nú er hetta summarið eisini farið, sigur Eiler Jacobsen.

Hann hevur nevnt verkætlanina Immanuel eftir sluppini, ið pápi hansara fórst við. Immanuel er ætlaður at vera ein sjálvsognarstovnur.

# Seta tøl á Hólmaætlanina

**Á afturlatnum fundi verður kommunustýrið á Eiði í kvøld kunnað um byggiætlanina í Hólmanum**

STADIONÆTLAN

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Skal nakar hugsingur vera hjá kommunustýrinum á Eiði um at fullføra ætlanina við at byggja stadion í Hólmanum, er neyðugt at projektera alla ætlanina og rokna út, hvat øll ætlanin fer at kosta.

- Nú fara vit at seta tøl á, men fyrsta treytin er, at kommunustýrið tekur undir við ætlanini, sigur Rólant Poulen, borgarstjóri á Eiði.

Hann torir ikki at gita, hvør samanlagdi kostnaðurin verður, tí bara fyrsta byggistig er boðið út, og tilboðið fyri tað arbeiðið er 1,8 mió. krónur. Øll útfyllingin er mett at kosta um fýra milliónir krónur, men tað kemur nógv aftrat. Onkur hevur mett eitt fullfíggjað stadion til at kosta ikki minni enn 20 mió. krónur.

### Ikki verið fyri fyrr

Kommunustýrið á Eiði samtykti fyri tveimum árum síðan at fylla út og planera økið, men sjálv verkætlanin hevur ongantíð verið fyri á fundi í kommunustýrinum.

Tað kemur broytta ætlanin í kvøld á afturlatnum fundi, sum verður beint undan almenna fundinum. Fundurin í kvøld er framskundaður. Eftir røttum skuldi fundurin verða 1. september, men við tað at borgarstjórin fer burtur og kemur ikki heim aftur fyrr enn hálvan september, hevur hann framskundað fundin til í kvøld.



*Bæði fuglafrøðifelagið og einstakir borgarar á Eiði hava roynt at steðga byggiætlanini í Hólmanum. Ein partur av lendinum er friðaður*

### Størri skuld

Rólant Poulsen leggur upp til, at byggingin verður fíggjað yvir raksturin, men tað kann gerast neyðugt at taka lán.

Hann argast inn á Fíggjarmálaráðið, sum broytti roknskaparháttin hjá kommununum, tí broytingin hevði við sær, at skuldin hjá Eiðis kommunu kom upp á 23 mió. krónur. Frammanundan var skuldin 14 mió. krónur, men við broytingini eru tær 9 mió. krónurnr í Felagsskúlanum á Oyrabakka lagdar aftrat.

Skuldin er á leið ein álíkning, og skal ein kommuna taka meira lán, krevur tað serligt loyvi frá landsstýrinum.

Rólant Poulsen nevnir annar, at kommunustýrið annars hevur møguleikan at hækka skattaprosentið. Skattaprosentið er nú 20 og kann setast upp til 23.